# Ikki neyðugt at hava bilin við

19. juni byrjar Atlantsflog at flúgva beinleiðis úr Vágum og til norska oljuhøvuðsstaðin. Hetta merkir aftur, at fólk hava ikki møguleika at taka bilin við sær. Men hesi fólkini hava einki at óttast fyri, tí á flogvøllinum í Stavanger, Sola, eru fleiri bilútleigarar. Á henda hátt ber til at ferðast runt í økinum og vitja øll tey kendu støðini. Bilarnir eru í góðum standi og kostnaðurin avgjørt rímiligur. Ein Opel Vectra kostar góðar 1700 krónur at leiga í tríggjar dagar við 600 kilometrum íroknaðum.























